ítróttur

Nr. 181 • leygardagur • 21. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

HB-Skála:

Tríggjar ferðir trý stig eftir

HB tók eitt risa-fet móti FM fyri viku síðani, men enn eru níggju stig eftir at spæla um, og tey fyrstu trý av hesum eru á skránni sunnudagin

Í HB er tað nú bert meistaraskapurin, sum kikarin er settur á, og tað verður í øllum førum trupult hjá Skála at broyta nakað hesum viðvíkjandi

UPPTAKT
Jákup Mørk

Eftir sigurin í Runavík er ynskið hjá viðhaldsfólkunum hjá HB vorðið til nakað væl meira enn bara eina vón. Høvdu ensku bookmak'arnir eisini verið í Føroyum, var alt spæl á ein meistara helst steðgað nú, og tey flestu eru eisini av teirri fatan, at HB longu hevur ognað sær heiðursmerkini.

Enn eru tó níggju stig eftir at spæla um hjá liðnum, og so leingi sum teoretiski møguleikin fyri spenningi er til staðar, er ikki alt avgjørt.

Ein dyst ísenn

Alt hetta eru teir í HB-hópinum eisini fult greiðir um. Sum skilst, so hava venjararnir báðir hesa vikuna lagt stóran dent á týdningin, sum tað nú hevur, av at taka ein dyst í senn. At trý stig sunnudagin eru fyrsta fortreytin fyri einum møguligum meistaraheitið. Og tí eru kanska heldur ikki so stór sannlíkindini fyri, at havnarmenninir fara at taka ov lætt upp á uppgerðina móti Skála.

Men tað er tó einki at ivast í, at lagið er gott í hópinum, og at roknað verður við einum sigri. Í mun til dystin móti NSÍ má HB hesa ferð verað Nicu Dogaru fyriuttan. Hann fekk fimtagula kortið í ár móti NSÍ, og verður tískil noyddur at sita uttanfyri. Hallur Danielsen er upplagdur avloysari til plássið á miðvøllinum, men venjarin hevur so eisini onnur kort at spæla við.

Einasta ivamálið hjá HB undan dystinum tykist vera Nocko Jokovic, sum aftur hevur fingið nakað av pínu í ryggin. Spurningurin er so, um hetta er nóg mikið til at halda vandamikla álopsmanninum uttanfyri, nú gullmerkini eru somikið nær.

Verja stigið

Skála slapp sær við sigrinum seinasta vikuskiftið av niðasta sessinum, og málið hjá teimum er sjálvsagt at halda seg omanfyri TB trý tey seinastu umførini.

Nýggi venjarin, Hans Jákup Davidsen, hevur framvegis 100% úrtøku við liðnum, men í Skála eru teir tó greiðir um, at hetta í øllum førum verður trupult at halda fast um sunnudagin. Boðini eru, at størstur denturin verður lagdur á verjupartin, og so verður bara dúvað upp á kontraboltar. At Skála so eisini kann hjálpa kommunufeløgunum úr Runavík, um teir taka stig frá HB, man neyvan gera tað verri, men fyrst og fremst skala Skála tó hjálpa sær sjálvum.

Sagt verður annars, at Skála hevur mest sum alt fólkið tókt. Dánjal Hansen hevur verið skaddur í fótliðinum í longri tíð, og hann verður neyvan tøkur. Vandi var eisini fyri, at Pauli Poulsen ikki fór at vera við, eftir at hann breyt tvær tenn í dystinum móti EB/Streymi, men hann hevur verið hjá tannlækna nakrar ferðir, og hevur eisini vant í vikuni. Esiini er málverjin, Eugen Voda, sum hevði leikbann seinast, við aftur í hópinum, sum soleiðis er á leið so sterkur, sum tað ber til, og tað verður eisini neyðugt, um stig skulu fáast burturúr móti liðnum, sum eftir øllum at døma er hitt sterkasta í ár.

Gongur framá

Á seinasta styrkislistanum hjá FIFA eru Føroyar farnar fýra pláss fram, men talan er framvegis um afturgongd í mun til støðuna við ársbyrjan

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Altjóða fótbóltssamgongan, FIFA, hevur nú kunngjort styrkislistan fyri september, og fyri føroyingar er hugaligt at staðfesta, at okkara landslið eftir góðu avrikini ímóti Liktenstein og Skotlandi hevur tikið seg fýra stig fram, soleiðis at vit nú eru á 119. plássi. Hetta er tó framvegis tvey pláss verri enn við ársbyrjan.

Hetta seinasta skal tó eisini síggjast í ljósinum av, at FIFA í summar broytti útrokingarháttin nakað, soleiðis at søgulig úrslit ikki telja eins nógv, sum tey áður gjørdu, og tí telja sigrarnir hjá okkum á eitt nú Malta fyri nøkrum árum síðani ikki eins nógv, sum teir gjørdu við ársbyrjan. Eitt av londunum, sum serliga hevur merkt broytingina er Noreg, sum nú er á einum 38. plássi, eftir at teir við ársbyrjan vóru nummar 25.

Niðanfyri prenta vit, hvussu tindurin á listanum sær út, eins og yvirlitið sýnir støðuna hjá norðanlondum og teimum londum, sum Føroyar eru í bólki við í innniverandi EM-undankapping. Tølini í klombrum sýna, hvørja støðu liðini høvdu fyri einum mánaði síðani.

1 (1)	Brasil
2 (4)	Frakland
3 (3)	Spania
4 (5)	Týskland
5 (2)	Argentina
6 (6)	Mexico
7 (11)	Turkaland
8 (9)	USA
9 (7)	Ongland
10 (9)	Italia
13 (12)	Danmark
22 (20)	Svoríki
38 (35)	Noreg
44 (40)	Finnland
54 (54)	Ísland
63 (60)	Skotland
101 (98)	Litava
119 (123)	Føroyar

Púra javnt á Toftum

Tað koppar hvørgan vegin, tá hagtølini fyri dystin á Toftum millum B68 og VB skulu samanberast. Seinastu 10 árini hava liðini vunnið fýra dystir hvør, eins og talið av málum hava verið 13 til hvørt liðið.

Í aðrar mátar sæst, at NSÍ hevur havt gott tak í TB, eins og KÍ hevur havt eitt hampuligt tak á GÍ, har uppgerðirnar mangan eru málríkar. B36 hevur bert tvær ferðir verið á Eiði, og enn hava teir so ikki tapt.

Talvan sýnir, hvussu tað hevur tørnað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju kappingarárini.

	'01	'00	'99	'98	'97	'96	'95	'94	'93	'92	Í alt	
EB/S-B36	0-2	-	-	-	-	-	-	1-1	-	-	0-1-1	1-3
TB-NSÍ	-	-	-	0-5	-	-	0-1	2-3	-	5-1	1-0-3	7-10
B68-VB	1-4	1-2	0-0	2-1	0-1	3-1	3-0	-	1-3	2-1	4-1-4	13-13
KÍ-GÍ	1-2	2-1	0-0	4-2	4-5	1-0	1-6	1-1	1-0	6-0	5-2-3	21-17
HB-Skála	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-	0-0-0	0-0

TB-NSÍ:

Jón skal lyfta TB

Nýggi venjarin sigur, at fyrst og fremst skal meira vilji í spælið, men tað verður ikki lætt móti NSÍ, sum framvegis roynir at spæla sín møguleika

UPPTAKT
Jákup Mørk

TB framdi í vikuni sítt næsta venjaraskifti, tá Jón og Óli Johannesen tóku við ábyrgdini, eftir at Lynge Nielsen helt seg hava staðfest, at hann ikki megnaði at seta leikararnar nóg væl upp til seinastu dystirnar.

Nýggjur venjari er Jón Johannesen, og saman við beiggjanum, Óla, skal hann nú royna at lyfta TB av aftur niðasta sessinum.

Men tað er eingin løtt uppgáva, og hetta ásannaði nýggir venjarin eisini alt fyri eitt, tá vit hittu hann á máli hóskvøldið.

- Tað, sum vit fyrst og fremst hava lagt okkum eftir, er at fáa spæligleðina fram aftur í leikararnar. Tað verður sjálvandi ikki lætt, nú tað hevur gingið somikið illa, men gleðin og viljin skulu til, um vit skulu hava nakran møguleika. Hinvegin veit eg væl, at tað verður sera trupult móti NSÍ, sum hevur sítt at stríðast fyri, men tað kunnu vit so ikki hugsa um. Vit skulu spæla okkara møguleika. Og hvussu dysturin sunnudagin so endar, so hava vit helst enn ein sera týðandi dyst annað vikuskifti á Skála, so tað ræður um ikki at missa mótið.

- Tað haldi eg heldur ikki, at leikararnir hava gjørt heilt. Sjálvandi hevur ringa gongdin merkt liðið, men eg haldi tað hevur gingið rætta vegin undir venjing, sigur Jón, sum framvegis ætlar sær at vera partur av liðnum.

Í mun til seinasta dyst verður nakað av útskifting á TB-liðnum, tí Sasha fekk leikbann tað ferðina, og hartil tykist greitt, at Milan Cimburovic heldur ikki verður tøkur. Hinvegin verður Dan Mortensen aftur á miðvøllinum, eins og Nebosja Urtajl eisini verður við, so alt í alt man tann kabalin ganga so nøkunlunda upp. So er spurningurin bert, hvussu Jón fer at blanda kortini, og um hetta so fer at rigga betri hjá undanmonnum hansara.

Tað er fyrst og fremst spæligleðin og stríðsviljin sum nýggi venjarin sigur seg vilja hava fram hjá leikarum sínum. Hvørt tað fer at eydnast móti NSÍ, er so ein spurningur, sum ikki verður svaraður fyrr enn sunnudagin

Jagstra gullið

Í Runavík ásanna tey, at tapið fyri HB seinasta vikuskifti helst var ein sera dyggur smeitur í gullstríðnum, men fyri tað tykjast teir ikki hava ætlanir um at seta ferðina niður.

- Tað ringasta, sum kann henda fyri okkum, vildi verið, um HB gerst meistari við 38 stigum, og vit bert hava 37. Vit kunnu røkka 39 stigum, og gera vit tað, so hava vit í øllum førum gjørt okkara, og so mugu vit síggja, hvussu langt tað røkkur.

Soleiðis sigur ein av leikarunum hjá NSÍ, Helgi L. Petersen.

Sjálvur verður Helgi tó ikki við sunnudagin. Hann hevur leikbann eftir enn eitt gult kort, men hann ætlar sær so avgjørt at vera til staðar á Sevnmýru kortini. Umframt Helga, er ivasamt, hvørt Ulrik Balling fer at vera tøkur. Lærkrikin, sum helt honum uttanfyri móti HB, argar framvegis, men hann hevur runnið nakað hesa vikuna, so vónirnar eru ikki heilt ongar fyri, at hann kortini fer at spæla.

Dystir um vikuskiftið

1. deild menn

22.09	EB/S-B36	Oddmar Andreasen
22.09	TB-NSÍ	Petur Skarðenni
22.09	B68-VB	Birgir Sondum
22.09	KÍ-GÍ	Páll Augustinussen
22.09	HB-Skála	Jens Petur Brattalíð

2. deild menn

21.09	LÍF-B71	Tummas Pauli Olsen
21.09	NSÍ-B36	Hans Falkvard Hansen
21.09	FSV-Sumba	Jón Kári Frederiksen
21.09	HB-ÍF	Rúni Gaardbo
21.09	VB-KÍ	Georg Rasmussen

3. deild menn

22.09	AB-B36	Kristoffur Vidtfeldt
22.09	TB-FSV	Poul Erik Jacobsen
22.09	B68-ÍF	Jákup Martin Kjeld
22.09	B71-GÍ	Eigil Olsen
22.09	HB-Royn	Dia Lamhauge

1. deild kvinnur

22.09	KÍ-B68	Palli Gergersen
22.09	B36-HB	Hans Eivind Olsen
22.09	Skála-GÍ	Jan E. Glyvradal

Støðan, 1. deild menn

		dystir	v	- j	- t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	HB	15	10	- 2	- 3	42	17	25	32
2	KÍ	15	9	- 3	- 3	37	19	18	30
3	NSÍ	15	9	- 3	- 3	29	15	14	30
4	GÍ	15	9	- 1	- 5	28	22	6	28
5	B36	15	8	- 3	- 4	46	24	22	27
6	B68	15	5	- 5	- 5	20	24	-4	20
7	VB	15	5	- 4	- 6	16	13	3	19
8	EB/Streymur	15	3	- 2	-10	17	37	-20	11
9	Skála	15	1	- 4	-10	12	34	-22	7
10	TB	15	1	- 3	-11	14	56	-42	6

Støðan, 2. deild menn

		dystir	v	- j	- t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	FS V	16	12	- 3	- 1	48	9	39	39
2	B36	16	6	- 5	- 5	26	28	-2	23
3	B71	16	6	- 4	- 6	26	18	8	22
4	KÍ	16	6	- 4	- 6	25	24	1	22
5	LÍF	16	6	- 3	- 7	28	25	3	21
6	ÍF	16	6	- 3	- 7	35	34	1	21
7	Sumba	16	6	- 3	- 7	22	32	-10	21
8	NSÍ	16	6	- 1	- 9	15	32	-17	19
9	VB	16	6	- 1	- 9	20	42	-22	19
10	HB	16	5	- 3	- 8	29	30	-1	18

Støðan, 1. deild kvinnur

		dystir	v	- j	- t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	KÍ	9	9	- 0	- 0	42	7	35	30
2	B36	9	6	- 0	- 3	25	16	9	20
3	B68	9	6	- 0	- 3	17	14	3	19
4	HB	9	2	- 2	- 5	15	17	-2	8
5	GÍ	9	2	- 1	- 6	7	27	-20	7
6	Skála	9	0	- 1	- 8	12	37	-25	1

KÍ-GÍ:

KÍ livir í FM vónini

Og í GÍ rokna teir framvegis við møguleikanum, at tað skal eydnast teimum at sleppa upp í part í Intertoto

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Við 3–3 javnleikinum í Gundadali ímóti B36 og HB sigrinum í Runavík minkaði FM vónin hjá KÍ rættuliga nógv. Men klaksvíkingar ætla sær at vera klárar, um tað óhugsandi skuldi komið fyri, og HB tapti ímóti Skála, EB/-Streymi ella TB.

Fyrsta treytin hjá KÍ er, at teir vinna allar sínar dystir. Tann fyrsti verður ímóti GÍ, og klaksvíkingar hava vant nógv í vikuni.

Hóskvøldið vóru allir átjan á vøllinum, sum hoyra til besta liðið. Rúni Elttør hevur verið sjúkur fyrra partin av vikuni. Hóskvøldið var fyrsta ferðin, at hann aftur var til venjingar.

Spurningurin er so, hvussu Kurt Mørkøre velur at blanda kortini. Sunnudagin í Gundadali var eyðsýnt, at tað eru einir tríggir ella fýra á beinkinum, sum væl eru førir fyri at vera við til at manna besta liðið. Men tað er bara møguleiki at hava ellivu á vøllinum í senn.

Kurt Mørkøre og Bjarte Vettelstad vóru ikki á besta liðnum ímóti B36. Tí hava teir møguleika at spæla við næstbesta liðnum í dag. Men so verða teir sjálvandi ikki tøkir í morgin.

Málverjin venur aftur

Hjá GÍ eru allir spælararnir tøkir. Millum hesar er Bárður á Lakjuni, sum fyrr í summar spældi á KÍ liðnum hvørja ferð. Nú skal Bárður royna seg ímóti fyrrverandi liðfeløgunum.

Síðsta sunnudag vardi Mortan Joensen GÍ málið ímóti B68. Hallur Hansen hevur gingið við koyktum fóti, men Hallur hevur verið til venjingar aftur í hesi vikuni.

– Vit hava ikki mist vónini at sleppa upp í part í Intertoto Cup. Tað verður torfort í Klaksvík, og vit mugu undir øllum umstøðum hava stig við til hús, heldur Magni Jarnskor, sum longu í 1984 var fyrstu ferð á besta liðnum hjá GÍ.

Ein av spurningunum hjá KÍ er, hvørt Hjalgrím Elttør aftur hesa ferð verður settur sum álopsleikari, ella um rúm skal gerast fyri Bjarte Vattelstad ell aKurt Mørkøre